

**Levi Mørk,**
*limur í bygginevndini fyri Myllutjørn*

# Myllutjørn veruleiki - ein prýði fyri Hoyvík og Tórshavn



*Bygginevndin: Frá vinstru Michael Jacobæus, nevndarlimur, Bjørgfríð Ludvík, nevndarforkvinna, Ronald Poulsen, byggiharrasamskipari, og Jan Christiansen og Levi Mørk, nevndarlimir. Uttast til vinstru í myndini hómast gamla Myllutjørnin. Myndin er tikin 21 .apríl 2010*

Mynd www.torshavn.fo

Nú 3. mai 2010 byrjar arbeiði eftir ætlan upp á útstyggingina við Myllutjørn í Hoyvík. Eg haldi, at henda byggiætlan er eitt gott alternativt við hesum 200 m² húsinum í mun til tey vanligu sethúsini sum fólk byggja í dag. Ein orsøk er, at nógv fólk vilja búgva í Hoyvík, og kommunan vinnur harvið byggilendi, tí biðilistin er stórur, og tú kanst byggja upp til 3 hæddir uppeftir og harvið vinnur kommunan jú byggilendi, hetta at byggja uppeftir er jú eisini vanligt aðrastaðni har kraftsentur eru.

Henda bygging er góð og vinarlig fyri barnafamiljur, eisini er henda byggiætlan góð fyri tey eldru, tí tú eisini kann byggja við bert einari hædd og harvið er tað meira eldravinarligt.

Eg frøist um, at hetta arbeiði nú byrjar, og hetta fer at lætta um langa bíðilistan upp á grundøkir í kommununi og samstundis fer hetta at skapa meira trivnað og aktvitet í Hoyvík, men hetta ger eisini, at tørvur er á øðrum facilitetum í Hoyvík innan mentunarøkið og vinnuøkið veksur, tað er eisini ein tørvsavbjóðing, sum Tórshavnar kommuna allatíðina arbeiðir við.

Tað er jú ikki nokk, at bjóða grundøkir og sethús, tí karmarnar og aktivitetir rundan um búðseting mugu eisini vera tilstaðar. Tað hevði verið frálíkt við nógvum vinnulívi í Hoyvík, her hugsi eg bæði um bankar og handlar.

Men at arbeiðið við Myllutjørn nú byrjar 3. mai 2010 er ein stór frøi fyri menningina í Hoyvík. Ein skal eisini hava í huga, at hetta fer at geva nógv arbeiði við sær, serliga innan byggivinnuna, sum er ein vinna sum hevur tað trupult í løtuni.

Eitt sindur um byggiætlanina kelda.www.torshavn.fo, eg loyvið mær at endurgeva hetta:

»Eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla er eitt øki, sum er um 22.000 m² til víddar. Økið verður útstykkjað til 64 grundøkir, ið eru uml. 200 m² til støddar hvørt. Alt grundøkið er tó 300 m², tí uml. 100 m² eru partur av fríøkinum, nevnd tún.

Túnini eru trý, og komandi er til teirra frá Karlamagnusarbreyt. Tað verða tríggir atkomuvegir til útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt.

Eftir komuvegnum frá Karlamagnusarbreyt kunnu bilar og fólk koma inn í túnini, ið verða miðsavnandi fyri býlingin. Úr túnunum verða gøtur til húsini. Felags parkering, ruskinnsavnan, møguliga postskipan, bilvask, spæl o.a. hjá yngri sum eldri verður miðsavnað um túnini. Til hvørt túnið eru uml. 20 hús.

Húsini, sum verða uml. 55 m² til støddar og í mesta lagi 3 fullar hæddir, koma at standa á einum grundøki, ið er uml. 200 m². Úthúsini/bilhúsini eru uml. 20 m².

Hvussu hús og úthús/bilhús skulu standa er samtykt í serstakari byggisamtykt fyri útstykkingina. Kostnaður fyri grundstykkini er mettur til kr. 486.681.« endurgeving endar.

Tað er Byggifelagið Hansen og Jacobsen, ið stendur fyri arbeiðnum og Uni Patursson, sum hevur prosjekterað og sum hevur byggieftirlitið.

Eg eri ikki í iva um, at henda byggiverkætlan verður eitt prýði fyri Hoyvík og Tórshavnar kommunu, og enn eru nøkur grundøkir eftir av teimum 64 grunøkinum, so tað er bara at halda seg framat.



**Bergtóra Høgnadóttir Joensen**

# Farið nú til verka

Fegnaðist, tá eg las tilmælini frá arbeiðsbólkinum um at basa ungdómsarbeiðsloysinum.

Gleðist um, at tað er eydnast landsstýrisfólkunum í mentamálum, vinnumálum og almannamálum at seta ein bólk at koma við tilmælum, og vóni eg nú, at tilmælini gerast veruleiki.

Tilmælini eru í høvuðsheitum hesi: Fleiri míðnámsskúlapláss, fleiri lestrarpláss á Setrinum, virkispraktikkir, aktivering og lærupláss. Hesi eru púra í trá við uppskotið til samtyktar hjá Tjóðveldi um hetta sama týdningarmikla mál. Eingin ivi er um, at vit í Tjóðveldi sjálvsagt taka undir við tilmælunum.

Tá vit so mangan hava sett fyrispurningar um ungdómsarbeiðsloysið hava landsstýrisfólkini sagt: "at hetta kundi verið eitt gott hugskot – meeen tíverrri hevur eitt annað landsstýrisfólk júst hendan partin av økinum um hendi." Ónøktandi fyri bæði landsstýrisfólk, uppskotsetara ella spyrjara.

Vænti, at landsstýrisfólkini heita á samgonguna um at taka undir við uppskotinum hjá Tjóðveldi. Ikki minst so tað gerst greitt, at tað er tingsins vilji, at tit fylgja tilmælunum frá arbeiðsbólkinum.

## Tilmælini

Sum nevnt eru tilmælini: fleiri miðnámsskúlapláss, fleiri lestrarpláss á Setrinum, virkispraktikkir, aktivering og lærupláss.

Vóni hetta merkir, at allir skikkaðir umsøkjarir sleppa á miðnám og Setrið í summar. Skúlin byrjar aftur longu í august. Eisini Dugniskúlan – fyrr ALVskúlin við Áir - mær er sagt, at munandi fleiri umsøkjarir eru í ár enn í fjør, tá bert annarhvør slapp inn.

Nýggja ALS lógin letur sum er upp fyri virkispraktikkum. Tað einasta okkum tørvar er ein kunngerð. Nær kunnu vit væntað hana? Nú er finna arbeiðsplássini har virkispraktikkirnar kunnu vera – um rætt verður borið at, eigur at vera gjørligt hjá nøkrum ungum fólkum at fara í virkispraktikk beinanvegin í summar.

Aktiveringsskipanir kunnu vit fara í holt við beinanvegin, um við seta reglurnar í gildi aftur hesum viðvíkjandi, sum vóru undir undir kreppuni í '90-unum. Alt hetta kunnu vit fara í holt við alt fyri eitt.

Lærupláss halda vit í Tjóðveldi, at vit áttu at sett krav um, tá størri verkætlanir verða bodnar út. Verkætlanir sum Skúlamiðdepilin í Marknagili, Psykiatriski Depilin, Flogvøllurin.

## Framtíðin

Tá eg lesi álitið – sum eg haldi er skilagott - síggi eg at: 'Mælt verður til at arbeiðið heldur fram, at ráðini fylgja gongdini í ungdómsarbeiðsloysinum, og gera neyðug tilmæli um tillagingar av verandi skipanum, so at átøkini fáast at virka. Eisini verður mælt til, at landsstýrið setur ein arbeiðsbólk, umboðandi allar avvarðandi partar at gera uppskot til arbeiðsmarknaðar- og útbúgvingarpolitikk.'

Hvussu tulka landsstýrisfólkini hesi orð? Vóni, at tey longu við hesum álitið seta nøkur munagóð átøk í verk her og nú.

Støðan er alt ov álvarslig til at vit kunnu bíða eftir fleiri tilmælum. Óført og neyðugt at arbeiða við skilagóðum arbeiðsmarknaðar –og útbúgvingarpolitikki, men her og nú er sanniliga eisini neyðugt við átøkum.

Longu farna heyst vistu vit, at ungdómsarbeiðsloysið var fimmfaldað upp á bert eitt ár – tað er framvegis vaksandi. Nú hava vit fleiri skilagóð tilmælið. Álvarsama støðan krevur, at farið verður til verka NÚ. Og tað ber væl til.